# Skúlabørn savnaðu 12.000 kr. til Haiti

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði, seinnapartin nakað minni vindur av útnyrðingi. Sólglottar, men eisini okkurt kavaælið og hitalagið millum -2 og +1 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum -2 og +1 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði, seinnapartin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin um frostmarkið.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið um frostmarkið.

Meðalhitin í December var 4,1stig móti 3,8 stig. Avfallið var bert 96 mm, móti 175 mm í meðal yvir 30 ár.

**INNSAVNAN**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinastu tíðina hava børn í Sankta Frans skúla í Havn savnað pening inn til hjálpararbeiðið, sum verður gjørt á Haiti eftir ógvusliga jarðskjálvtan.

Longu tíðliga varð gjørt av, at innkomnir peningurin skuldi fara til Frelsunarherin, og har vóru tey feing, tá tey í vikuni fingu handað 12.000 krónur frá skúlanæmingunum. Peningur, ið fer óskerdur til hjálparbeiðið, sum Frelsunarherurin ger á Haiti.

Frelsunarherurin kom til Haiti í 1950 og hevur 49 skúlar umframt barnaheim, sjúkrahús, heilsumiðstøðir og matútdeiling.

- At fáa eina so stóra gávu frá Sankta Frans skúla er bara heilt ótrúliga flott. Vit vilja takka skúlanum so hjartaliga, og ynskja at Harrin skal vælsigna tey afturfyri, sigur Jacobina Ovadóttir Heinesen, loytnatur hjá Frelsunarferinum í Føroyum.

- Nógvir av bygningunum hjá Frelsunarherinum eru lagdir í oyðu, og barnaheim eru eisini oyðiløgd. Boð komu um, at einki barn av teimum ið búgva á heiminum var deytt í ógvusliga jarðskjálvtanum. Frelsunarherurin hevur eisini fjarð-ættleiðing, og fleiri av børnunum í Port-au-Prince hava norsk fjarættleiðingarforeldur. Tey børnini hava ikki fastan bústað á barnaheiminum, men koma har um dagin, og frá teimum 276 børnunum vita vit einki, sigur Jacobsen.



*Tað var 3. flokkur í Sankta Frans skúla, sum tók stig til innsavnina, og skjótt gjørdist restin av skúlanum partur av átakinum*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -9 |
| Nuuk | -5 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | |
| Aberdeen | 4 |
| London | 5 |
| Tromsø | -3 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | -5 |
| Stokkhólm | -3 |
| Keypmannah. | -3 |
| Helsinki | -10 |
| Moskva | -15 |
| Berlin | -11 |
| Warzawa | -13 |
| Kiev | -16 |
| Bukarest | -13 |
| Paris | 4 |
| Madrid | 10 |
| Róm | 10 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 6 |
| Malta | 13 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 1 |
| New Dehli | 20 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | 2 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 32 |
| La Paz | 7 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 32 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 1015 hPa. yvir Íslandi fer í landsynning.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið vestan fyri Lofoten fer suðureftir og gevur vaksandu høgættavind á okkara leiðum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/01 kl. 06⁰⁰ – 25/01 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,2°
Minsti hiti máldur í januar: -10,5° -
Mesti hiti máldur í januar: +13,7°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 24/01 kl. 06⁰⁰ – 25/01 06⁰⁰.
Avfallið higartil í januar: 121 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

23. januar: Fyrra kvarter
30. januar: Mánin næstur jørðini/ fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 28. jan | 04:37 | 17:05 | 03:37 | 16:05 | 03:52 | 16:20 | 06:37 | 19:05 | 07:37 | 20:05 | 02:52 | 15:20 | 01:52 | 14:20 | 04:52 | 17:20 | 05:52 | 18:20 | 04:22 | 16:50 | 05:37 | 18:05 |
| 29. jan | 05:34 | 17:59 | 04:34 | 16:59 | 04:49 | 17:14 | 07:34 | 19:59 | 08:34 | 20:59 | 03:49 | 16:14 | 02:49 | 15:14 | 05:49 | 18:14 | 06:49 | 19:14 | 05:19 | 17:44 | 06:34 | 18:59 |
| 30. jan | 06:25 | 18:52 | 05:25 | 17:52 | 05:40 | 18:07 | 08:25 | 20:52 | 09:25 | 21:52 | 04:40 | 17:07 | 03:40 | 16:07 | 06:40 | 19:07 | 07:40 | 20:07 | 06:10 | 18:37 | 07:25 | 19:52 |
| 31. jan | 07:19 | 19:44 | 06:19 | 18:44 | 06:34 | 18:59 | 09:19 | 21:44 | 10:19 | 22:44 | 05:34 | 17:59 | 04:34 | 16:59 | 07:34 | 19:59 | 08:34 | 20:59 | 07:04 | 19:29 | 08:19 | 20:44 |
| 1. feb | 08:10 | 20:34 | 07:10 | 19:34 | 07:25 | 19:49 | 10:10 | 22:34 | 11:10 | 23:34 | 06:25 | 18:49 | 05:25 | 17:49 | 08:25 | 20:49 | 09:25 | 21:49 | 07:55 | 20:19 | 09:10 | 21:34 |



Forelskað?

Vís tað í Sosialinum

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo